Televarpi væntar vøkstur í vetur

Hava føroyingar sum heild higartil tikið væl undir við Televarpinum, so sær stjórin tó fyri sær eina stóra tilgongd í vetur.

[SJÓNVARP]

Búi Tyril
tyril@PRnewsMedia.com

Alt bendir á at Televarpið hevur fingið ein ferman fót á tí føroyska marknaðinum fyri fylgisveina sjónvarp. Meðan leiðslan frøist um øktan sendikapasitet og betraða tænastu, setir hon samstundis nøsina fram ímóti einum uppsvingi í vetur.

»Vit eru væl nøgd við gongdina,« segði stjóri Televarpsins, Laila Hentze. »Fólk eru vorðin meira von við Televarpið samstundis sum tøkniligar ábøtur hava verið gjørdar og úrvalið av rásum er víðkað, umframt at sendinetið er útbygt… Skjótt síggja Hósvík og Vestmanna, og seinni vónandi meginparturin av Vágunum eisini, signalið frá okkum. Tá røkkur sendinetið út til umleið 80 prosent av landinum, hvat ið fyribils má metast sum handilsliga optimalt í samanhanginum.«

»Sølutølini vísa ein fínan vøkstur í undirtøku millum fólk, men eg vænti at nú í vetur fara vit at síggja eina enn størri tilgongd. Á vetrarsita fólk vanliga meira inni enn tey gera á sumri, og júst komandi vetur verður okkara fyrsti á hesum menningarstigi.«

Sambært leysligum metingum situr Televarpið ídag á umleið helvtini av marknaðinum fyri fylgisveina sjónvarp í Føroyum, í harðari kapping við fyrst og fremst nakrar av pakkunum frá Canal Digital.

»Vit samstarva bæði við Canal Digital, Viasat og Sjónvarp Føroya, og eg haldi vit hava fingið nakrar passaliga samansettar pakkar,« segði Laila Hentze. »Og so hava vit eisini Rás 1.«

Men Televarpið er bundið av føroyskari lóg, hvat veitarar í útlandinum ikki eru. Er hetta ein trupulleiki?

»Nøkur meina at vit missa viðskiftafólk gjøgnum at sløkkja fyri onkrum av teimum sendingum ið annars verða vístar á ávísum rásum. Talan er um ein kappingar avlagandi tátt sum liggur í at vit mugu fylgja lógum sum útlendskir veitarar sleppa undan. Men har kann tað øvugta eisini vera galdandi, nevniliga at barnafamiljur og onnur heldur vilja sleppa undan at fáa tilfar av tí slagnum inn um stovugátt; tá kann ein skerjing gerast ein fyrimunur fyri okkum í kappingini. Úrvalið er kortini so ótrúliga stórt!«

Altjóða kynslig kreppa ávegis

Ein dramatiskur vøkstur í nøgdini av kynsliga yvirførdum smittum órógvar heilsumyndugleikar víða um; í Føroyum konstaterar landslæknin eitt vaksandi tal av Klamydia tilburðum

[FÓLKAHEILSA]

Búi Tyril
tyril@PRnewsMedia.com

Í nógvum londum órógvast nú heilsumyndugleikar av einum explosivum vøkstri í kynsliga yvirførdum smittum herundir Syfilis, Klamydia, Gonorré og HIV. Sum gongdin hevur verið nógvastaðni tey seinnu árini, eru tær kynsligu smittusjúkurnar av álvara við at sláa til móti stórum fjøldum sum tykjast tiknar við brókunum niðri.

»Raturnar av HIV smittu hevur verið fallandi í nógvum londum tey seinastu tíggju árini,« skrivar altjóða tíðarritið 'Newsweek' í einari stórt uppsettari grein um alarmerandi útbreiðslu av kynsliga yvirførdum smittum. »Men tey góðu tíðindini eru yvirskuggað av teimum sera skjótt reisandi ratunum av øðrum sexuelt transmitteraðum sjúkum.«

Okkara landslækni, Høgni Debes Joensen, fylgir sum vera man væl við gongdini á hesum leiðum, og hann hevur eisini noterað ein stóran vøkstur av Syfilis, Klamydia og Gonorré í kongaríkinum Danmark. Meðan hann varisliga fegnast um at í Føroyum tykist støðan nakað øðrvísi hvat teimum vandamiklaru sjúkunum viðvíkur, so ávarar hann um at Klamydia eisini er um at breiða seg her.

»Tíverri er í Norðurlondum staðfestur nógvur vøkstur av Syfilis, Klamydia og Gonorré,« segði landslæknin. »Hvat viðvíkur Klamydia so sæst trendurin aftur her eisini, tó í minni mun enn í Danmark; og tíbetur hava vit ikki staðfest nakra øking í tilburðum av Syfilis og Gonorré. Hvat HIV viðvíkur er ein tilbúður staðfestur í 2000 og ein í 2003. AIDS er ikki staðfest í Føroyum síðani 1995.«

Hvat Klamydia viðvíkur liggja Føroyar, í mun til fólkatalið, umleið á hálvum stigi í mun til Danmark. Á Flatlondum liggur tað árliga talið av Klamydia tilburðum um 1600 sambært almenn hagtøl.

Hagtølini fyri positivar prøvar av Klamydia í Føroyum vísa ein javnan vøkstur tey seinastu trý árini: 74 tilburðir í 2001, 80 tilburðir í 2002, 87 tilburðir í 2003. Seinasta fráboðan av Syfilis liggur 11 ár afturi í tíðini, og Gonorré, ið eisini skal fráboðast landslæknanum, var seinast fráboðað fyri fýra árum síðani.

340 mió nýggir tilburðir

»Í hesum døgum er óvitan um sexuelt transmitteraðar infektiónir, ella STI, felags fyri mangar tanáringar og ung vaksin kring heimin,« skrivar Newsweek, »og hetta er í ferð við at føra til eina nýggja globala heilsu kreppu. Á hvørjum ári verður boðað frá 340 milliónum nýggjum tilburðum av STIum — ein 40 prosent vøkstur síðani 1990, sambært World Health Organization. Tað mest órógvandi er at meira enn helvtin av øllum nýggjum tilburðum av STIum fyrikoma millum ungar menn og kvinnur undir 25 ár, og av hesum siga 41 prosent seg hava havt óvart sex undir tí seinasta árinum. Fyri tíggju árum síðani mettu serfrøðingar innan heilsurøkt at prostitueráð, homosexuellir menn og intravenøsir rúsevna misnýtarar útgjørdu high-risk bólkin. Ídag er størsti vandabólkur, sambært nýggjum World Bank frágreiðingum, fólk undir 25 ár.«

»Tann manglandi tilvitskan um kynsliga heilsu líkist einum bakkasti aftur til tíðliga í 1980unum, áðrenn hóttanin frá AIDS kastaði ein deyðans skugga yvir tilvildarligt sex,« skrivar Newsweek víðari.

Ein tørvur á kynsligari útbúgving er ikki øll søgan, meinar tíðarritið, og vísir til eina mentan av gáloysnum kynslívi sum hevur vunnið fram millum tað yngra ættarliðið. Í USA hava miðlafrásagnir nýliga profilerað framvøksturin av 'vinum við fyrimunum' — tað er tanáringar ið deila kynsligar tænastur á óbundnum stigi. Traditionell málgøgn sum MTV, internet porno og sendingar sum 'Sex and the City' verða, saman við nýtslu av alkoholi og øðrum rúsevnum, útpeikað sum viðvirkandi orsøkir til vaksandi promiskuitet.

Skemtilig løta hjá pensjónistunum

Mikukvøldið byrjaði Pensjónistafelagið í Havn aftur hugnaløturnar, sum verða hildnar í Losjuni hvørt mikukvøld vetrarmánaðarnar

PENSJÓNISTAHUGNI

Myndir: Jens K. Vang
Orð:Rúna Sivertsen
runa@sosialurin.fo

Dúgliga varð sungið og søgurnar vóru nógvar í Losjuni mikukvøldið, tá pensjónistarnir savnaðust aftur aftaná summarsteðgin

Tað nýtist als ikki at verða keðiligt at gerast pensjónistur - og tað var eisini alt annað enn keðiligt í Losjuni mikukvøldið, tá pensjónistarnir savnaðust aftur aftaná summarsteðgin.

Borðreitt var við heimabakaðum breyði og viðskera, dúgliga varð sungið og søgurnar vóru nógvar.

Erling Poulsen var ein av teimum umleið 40 fólkunum, ið høvdu leitað sær í Losjuna hetta kvøldið. Hann hevur verið lærari í mong ár, og veit nógvar góðar at fortelja frá skúlatíðini. Ein av teimum er um dreingin, sum hvønn einasta morgun var ov seinur í skúla og hvørja ferð hevði eina nýggja umbering. Ein kaldan vetrarmorgun við frosti og kava, er drongurin, sum ikki einaferð, ov seinur. Lærarin spyr, hvat nú er á vási og hví hann aftur er ov seinur. Jú, sigur drongurin, eftir at hava hugsað seg um lítla løtu - vekjaraklokkan var fryst...

Erling sigur, at hann gloymir ongnatíð rópini og láturin frá hinum næmingunum, tá drongurin kom við hesi heldur ivasomu frágreiðing.

Og láturin skortaði heldur ikki millum pensjónistarnar hesar frálíka hugnaligu tímarnar, hugnaløtan varði.

Skráin á hugnaløtunum mikukvøldini er ymisk og fjølbroytt. Við hvørt verða fyrilestrar hildnir, ella hugt verður at filmi. Onnur kvøld verður farið upp á gólv, og komandi mikukvøld er ætlnanin at hava bingo. Tá bingo er á skránni, kunnu limirnir hava gest við sær.

Pensjónistafelagið hevur um 110 limir. Ása Dam er forkvinna, men er burturstødd í løtuni, so tey, sum ynskja at gerast limir, kunnu venda sær til næstformannin, Suna Joensen á telefon, 313409.

Tá spælimaðurin, sum skuldi koma at spæla, fekk forfall, var Johannes Simonsen skjótur at kasta arbeiði frá sær og koma í Losjuna við harmoniku sínari

Tey gomlu duga sanniliga at skemta sær. Tað er Hanna Lindenskov til vinstru, ið hevur yrkt skemtiliga sangin, vit prenta her á síðuni

Borðreitt var við heimabakaðum breyði og viðskera. Ein fulgur sang, at Suni Joensen hevði bakað bæði rugbreyð og hvítt breyð - í hvussu er og ikki, smakkaði alt avbera væl

Tað man hava verið, tá Pensjónistafelagið helt til í Ydun í Reynagøtu, at Hanna Lindenskov yrkti henda skemtiliga sangin

Lag: Den er fin med kompasset

Ert tú gránað í erva
og møðin man nerva
stutt sagt, er tú nú vorðin gomul og grá.
:,:So miss ikki mótið,
men lyft bara høvdið,
tí oman í Ydun kanst tú altíð gá,
Tralala lalala....:,:

Tú stúrir og skrukkar,
tað andlitið rukkar,
so minst til, at tú tekur smílið uppá
:,: Ver glað nú í sinni, goym bara ljós minni.
Tú verður til sins sum til dansin at gá.
Tralala lalala....:,:

Aleina at sita,
ja, tað skalt tú vita,
tað er ikki gott fyri gomul og grá.
:,: Kom út millum manna,
og tú fært at sanna,
at betur tað er sær ein sjavsin at fá.
Tralala lalala....:,:

Um tú kennir teg troyttan
og móðan, uppроyttan,
ja, hóast tú tekur dagligt med'sin
:,: Tú skalt mær trúgva -
eg vil ikki lúgva -
Tað besta jú er eitt hjartaligt grin.
Tralala lalala....:,:

Og túrar at ganga
- um ei av tí langa -
er kondi so gott fyri gomul og tung.
:,: Ei bara at sita,
men gumpin at flyta,
um ikki so nógv, sum tá vit vóru ung.
Tralala lalala....:,:

Um líktorn tú hevur,
og um tað teg gremur,
so vil eg tær geva her ráðini góð:
:,: Eitt fat tú tær tekur,
og grýn í tað letur,
av vatni so mikið, um øklarnar stóð.
Tralala lalala....:,:

O sum tú nú situr,
Og føturnar flytir
Og filosoferar um mangt og um hvat:
:,: Um Gággan enn spældi,
heilt sikkurt eg haldi,
eg hevði mær svingað. Nei, Halt nú uppat!
Tralala lalala....:,:

So grá og so gomul
vit verða øll somul,
sum unnast at liva í hesari verð.
:,:Men sinnið tað unga
uppvigar tað tunga
so aldurin als einki okkum hann ger.
Tralala lalala....:,: